**Býráðsfundur hósdagin 27. mei 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.45**

**Fundarskrá:** / **Fundarsamtykt:**

**1. 13/00199**
**Samanlegging av matr. nr. 128d og 168 í Leirvík – bygningarnir hjá Frítíðarheiminum**
Umsitingin mælir til at leggja omanfyri nevndu matriklar saman til ein matrikul, tí at Frítíðarheimið liggur sum er á 2 matriklum.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at leggja matriklarnar saman.

*Fundarsamtykt:* Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**2. 13/00128**
**Umsókn byggiloyvi til Tavuna**
Býráðið samtykti á býráðsfundi tann 25. mars 2013 at arbeiða víðari við málinum. Kommunan hevur móttikið nýggjar tekningar sum lýsa innrætning, kloakkleiðingar, mátsetingar og hæddir á bygningunum, umframt lýsing av tilfarinum.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at geva byggiloyvi til Tavuna, men byggiloyvið verður ikki útskrivað fyrr enn góðkendur brunaplanur er móttikin.

*Fundarsamtykt:* Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

**3. 13/00126**
**Grundstykkjalisti**
Á býráðsfundi tann 25. mars 2013, var einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá Byggi- og býarskipanarnevndini ið er:

*Mæla til at fáa grundstykkjalista fyri bygdirnar og at gera leiðreglur sum eru greiðir hjá umsøkjarum. Somuleiðis skal kommunan hevur greiðar heimildir m.a. at bjóða grundstykki til keypara uttan at gjøgnumganga allan listan hvørja fer ein umsókn kemur inn.*
*Uppskot er m.a. at senda dagførdan lista út einafer um árið og at kommunan samstundis hevur eitt yvirlit yvir hvar umsøkjari ynskir at búleikast og hvar skal útstykkjast.*

*Fundarsamtykt:* Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

**Býráðsfundur hósdagin 27. mei 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.45**

Umsitingin hevur gjørt eitt uppskot til leiðreglur fyri grundstykkir og bíðilista á grundstykkjalistanum í Eysturkommunu.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at leiðreglurnar verða samtyktar við onkrum broytingum í tekstinum.

**4. 13/00234**

**Áheitan frá Báta og – listasavninum í Leirvík á kommununa, um at velja eykalim í nevndina fyri savnið**

Mentanarnevndin mælir til at velja Emmu Rasmussen til eykalim í nevndina fyri Báta – og listasavnið í Leirvík

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

**5. 13/00180**

**Umsókn um fígging av Báta – listasavninum í Leirvík**

Á býráðsfundi tann 29. apríl 2013, var samtykt at savnið skuldi koma við eini virksemis – og rakstrarætlan. Nýggj áheitan er komin frá Báta - listasavninum og heitir savnið á Eysturkommunu at fíggja raksturin hjá savninum við eini árligari upphædd á kr. 150.000

Mentanarnevndin viðgjørt málið aftur á fundi tann 15. mei og mælir til at veita Báta – og listasavninum í Leirvík fígging til raksturin av savninum áljóðandi kr. 150.000, og at upphæddin verður fíggja við eykajáttan.

Mentanarnevndin heitti á savnið um at koma við eini virksemis – og rakstrarætlan, men fyriliggur framvegis eingin rakstarætlan.

Vinnunevndin hevur viðgjørt umsóknina aftur tann 16. mei og mælir til til veita Báta – og listasavninum í Leirvík fígging til raksturin av savninum áljóðandi kr. 70.000,00, og at upphæddin verður fíggja við eykajáttan.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur hósdagin 27. mei 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.45**

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini.

**6. 13/00136 og 13/00160**
**Fríðkanarætlan 2013**

Trivnaðarnevndin og tekniski leiðarin hava verið úti og hugt eftir fríøkjum í bygdunum, tó ikki í Leirvík, sí Notat frá túrinum sum liggur í málinum.

Trivnaðarnevndin hevur á fundi tann 13. mai 2013 mælt til, at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini og at arbeitt verður víðari við ætlanini, saman við Búgva Róin um hvat gerast skal í 2013. Síðan verður farið í gongd við at gera ein langtíðar fríðkannarætlan fyri Eysturkommunu.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá Trivnaðarnevndini og harumframt at gera gøtuna frá vegnum “ í Tungu “ og oman til vegin “ við Matará “

Arbeiði er mett at kosta 180.000,00 kr., íroknað arbeiðsmenn hjá kommununi, og verður fíggja av konto 6.11.32.510 Fríðkan av kommununi (Rakstrarjáttan)

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndin. Fíggjarnevndin hevur tað viðmerking at tað eigur at verða gjørd ein ætlan, fyri alla kommununa, sum verður løgd fyri býráðið til  til støðutakan.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

**7. 12/00349**
**Umsókn um at økja um grundøkið til matrikul 23, Fyri oman Brúgv 2, Syðrugøta – ella at gera flísatún**

Umsøkjarin, Ólavur Gregersen, hevur ynskji um, at leggja flísar á túnið hjá teimum og nakað inn á kommunalt øki.
Kommunan hevur gjørt eitt uppskot til flísar fram við vegnum/gongubreytir og økið rundanum sambært verkætlan ið kommunan hevur gjørt fyri økið Syðrugøtusandur.

Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Hanna Jensen, Brandur Jacobsen

**Atkvøddi ímóti:**

**Býráðsfundur hósdagin 27. mei 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.45**

Teknistovan hevur gjørt uppskot til flísar á gongubreytir og tún sum her verður lagt fram til góðkenning.

Oluffa Joensen

Á fundi í Byggi- og býarskipanarnevndini tann 17. apríl 2013 var samtykt, at biðja Teknistovuna gera tillagingar av økinum millum vegin Gróargøta og oman á sandin við atliti til, at stórir pallur kann koyrast oman á sandin. Somuleiðis skal integrerast brúsir á økinum til tey sum baða á sjónum og spæla á sandinum. Samstundis verður kannað um kloakkleiðingar skulu flytast ella leggjast um, umframt kostnaðin til eina serstaka flís við búmerkinum hjá kommununi og ljós á økið.

Somuleiðis er samtykt at bjóða arbeiði við álegging av flísum á kommunalt øki. Arbeiði verður bjóða út sum undirhondsboð til 2 arbeiðstakarir – múrari Jan Andersen, Klaksvík og Ingolf Hansen, Runavík.

Málið var fyri í fíggjarnevndini, sum mælir til at umsóknin hjá Ólavi Gregersen verður gingin á møti, og at áleggingin av flísum á kommunalt øki verður gjørt í samráð við umsitingina hjá Eysturkommunu.

Býráðið samtykti á býráðsfundi tann 29. apríl 2013 at beina málið aftur í nevnd til viðgerðar.

Byggi- og býarskipanarnevndin hevur viðgjørt málið aftur á fundi tann 15. mei 2013 og mælir tá frá at geva Ólavur Gregersen loyvi til at leggja físar á kommunalt økið.  Byggi- og býarskipanarnevndin mælir eisini til, at kommunan gera arbeiði við flísaálegging eftir gongubreytini í ovara síðu ( fram við hjá Atla Feilberg, Ólavur Gregersen og Valhøll) umframt økið veghornið við Juksunará og Gróvargøta. Arbeiðið er mett at kosta kr. 150.000,00 uttan mvg og verður fíggja av konta 6.11.32.511 Fríðkan av bygdunum (løgujáttan).

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið aftur á fundi tann 21 mei., og mælir til at taka undir við

**Býráðsfundur hósdagin 27. mei 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.45**

tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**8. 13/00248**

**Fíggjaræltan fyri bókasøvnini fyri 2014**
Støðutakan til uppskot frá bókasavnsnevndini til fíggjarætlan fyri 2014.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá bókasavnsnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**9. 13/00261**

**Roknskapur 2012**
Góðkenning av roknskapi fyri 2012.

Fíggjarnevndin mælir til at góðkenna fyriliggjandi roknskap.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**10. 13/00045**

**Keyp av gravimaskinu í 2013**
Málið um keyp av maskinu umrøtt á fundi tann 13. februar 2013 og samtykt var, at umsitingin kannar málið neyvari og leggur málið fyri á fyrst komandi fundi.

Tilmæli frá fíggjarnevndini og byggi- og býarskipanini fyriliggur.

*Málið verður viðgjørt fyri afturlætnum hurðum*

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

**11. 13/00216**

**Tilboð uppá betong og timburarbeiðið á Gásamýri**
Støðutakan til innkomin tilboð

Tilmæli frá fíggjarnevndini fyriliggur

*Málið verður viðgjørt fyri afturlætnum hurðum*

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini, og taka av lægsta tilboðnum, sum er frá Sp/f TJ Smíð, áljóðandi kr. 1.236.988,00 uttan mvg.

*Jóhan Christiansen var úti undir viðgeðini vegna ógegni*

**Býráðsfundur hósdagin 27. mei 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.45**

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________________

Hanna Jensen ______________________________

Hanus Jacobsen ______________________________

Emma Rasmussen ______________________________

Hjalti Dalheim ______________________________

Ólavur Olsen ______________________________

Árni Jacobsen ______________________________

Oluffa Joensen ______________________________

Brandur Jacobsen ______________________________